gult16 cyan16 magenta16 svart16



# Úr Umanak á fiskivinnustevnu

FISKIVINNUMESSA

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Runavík: Vinnulívsstjórin í Umanak kommunu í Grønlandi, Niels Løvstrøm, og fiskistjórin, Apollo Mathiassen, eru á fiskivinnustevnuni í Runavík, og teir fjala ikki út yvir, at AWI-bátarnir hava lokkað teir langa vegin til Føroya.

– Vit hava áhuga í øllum tí nýggjasta innan fiskivinnu, sum vit kunnu brúka í okkara kommunu, men serliga eru tað AWI-bátarnir hjá Aðalstein Antoniussen, sum lokka. Hesir bátar eru sera væl egnaðir til okkara leiðir. Higartil hava vit fyri tað mesta roynt eftir svartkalva, men nú krabbafiskiskapurin hevur tikið seg upp longur suðuri í Grønlandi, seta vit stórar vónir til hendan fiskiskap eisini her hjá okkum, sigur Niels Løvstrøm, vinnustjóri.

– Vit eru sera spentir uppá nýggja 39 fóts AWI-bátin. Hann er væl egnaður, tí hann hevur so stórt dekk. Hann ber seg væl og riggar eisini væl í ísinum og er sterkur, sigur Apollo Mathiassen.

Umboð fyri fimm grønlendskar kommunur eru á fiskivinnustevnuni í Runavík.

– Vit bjóðaðu øllum kommununum í Grønlandi, sum vit hava havt samskifti við til fiskimessuna, og tað hevur loyst seg, hyggja vit eftir grønlendsku luttøkuni, sigur Eyðun Antoniussen frá AWI Boats.




*Mynd: Jens K. Vang*

# Maður ákoyrdur á ferjuleguni

**Leygardagin hendi eitt óhapp á ferjuleguni í Leirvík, tá ein maður varð yvirkoyrdur av bili á veg í land. Nú verkfalsvaktir og forðingar standa á bryggjuni er sera trongligt hjá ferðafólki og bilum at sleppa til og frá Dúgvuni, men Strandferðslan og arbeiðarafeløgini á staðnum halda ikki, at trygdin er niðursett av forðingunum**



*Sera trongligt er á ferjuleguni í Leirvík, nú forðingarnar hjá verkfalsvaktunum standa frammanfyri rampuni Savnsmynd*

VERKFALL

*Stefan í Skorini*

Umstøðurnar hjá ferðafólki og bilum at sleppa í land og umborð á Dúgvuna í Leirvík eru versnaðar, nú forðingarnar hjá verkfalsvaktunum avmarka plássið hjá ferðafólki og bilum at avgreiða síni ørindi á ferjuleguni.

Tinglimir og onnur hava eisini gramt seg um og víst á, at trygdin umborð á strandfaraskipunum ikki er í lagi, tá ferðafólk skulu í land og umborð á skip eftir somu landgongd sum bilarnir. M.a. verður ført fram, at fólk standa á bildekkinum, áðrenn skipið hevur lagt at.

Leygardagin beint eftir middag hendi eitt óhapp á ferjuleguni í Leirvík. Ein maður var yvirkoyrdur, tá hann gekk tvørturum gloppið í forðingunum, har bilarnir koyra út, og beinið kom at liggja undir dekkinum.

Sera nógv fólk varð savnað á ferjuleguni um hetta mundið, tí tey bíðaðu eftir at sleppa umborð. Tí savnaðist nógv fólk frammanfyri lítla opinum í forðingunum og bíðaði eftir at bilarnir vóru farnir í land. Sostatt var nógvur meldur á ferjuleguni.

### Trygdin ikki niðursett

Strandferðslan sigur, at hennara ábyrgdarøkið gongur bara til endan á rampuni. Økið á bryggjuni sjálvari hava havnarmyndugleikarnir ella løgreglan ábyrgdina av. Tí hava Strandfaraskip Landsins ikki ábyrgdina av, hvat fer fram á bryggjuni sjálvar. Hetta vísir Reidar Nónfjall, stjóri, á.

Hann sigur, at enn hava tey ikki fingið nakra fráboðan frá manning ella skipara um, at trygdin ikki er í lagi.

Pól Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari, metir heldur ikki, at trygdin er niðursett av forðingunum. Hann vísir á, at ferðafólk og bilar verða hildin skild hvør frá øðrum. Um óhappið sigur hann, at sum honum er greitt frá, so var tað eitt hendiligt óhapp, ið kann koma fyri, men sum sjálvandi er sera óheppið.

### Kann ikki gerast øðrvísi

Jógvan Heinesen, formaður í Leirvíkar arbeiðsmannafelagi, ið skipar fyri forðingunum, metir heldur ikki, at ferðafólkini eru í størri vanda nú enn áður. Hann vísir samstundis á, at trygdin umborð á skipunum ikki altíð er av teimum bestu.

Sambært Jógvani Heinesen gongur alt fyri seg við skili, tá ferðafólk fara umborð og í land, og hann vísir á, at manningin ger sítt arbeiði til lítar.

Formaðurin sigur, at forðingin ikki kann gerast stórvegis øðrvísi, tí endamálið er, at bilar við vøru als ikki skulu sleppa í land. Tí verður forðingin ikki broytt.

# Á jøvnum føti við útlendingar



FISKIVINNUMESSA

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Runavík:Stóra altjóða fiskivinnustevnan í Runavík varð sett við hornblástri og kórsangi og mynigu røddini hjá Anfinni Kallsberg, løgmanni. Hann fegnaðist um, at hesaferð sýndu føroyingar fram á jøvnum føti við útlendingar, har aðalmálið er at selja um landamørk.

gult17 cyan17 magenta17 svart17



# Barnatroyggja við kraga

## Uppskriftin hesa vikuna



| **Størrelser:** | | 4 | 6 | 8 | 10 | 12/14 år |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Overvidde:** (plaggets mål) | Ca. | 73 | 79 | 87 | 96 | 104 cm |
| **Hel lengde:** | Ca. | 44 | 46 | 48 | 50 | 54 cm |
| **Ermelengde:** | Ca. | 32 | 34 | 36 | 38 | 42 cm |

**MATERIALER: Gjestal helårsgarn (100 % bomull), nøster à 50 g.**

| blålilla nr. 948 ca. | 9 | 10 | 11 | 12 | 13 nøster |
|---|---|---|---|---|---|

**Pinner:** Rette p og strømpep nr. 3½ og 4 eller 4½.

**Vanlige forkortelser**
M=maske, r=rett, vr=vrang, str=strikk, p=pinne, omg=omgang, vr-bord=vrangbord, glattstr=glattstrikk, rettstr=rettstrikk, vrangbordstr=vrangbordstrikk, kantm=kantmaske, arb=arbeidet, beg=begynn, forts=fortsett, sm=sammen, g=gram, bunnf=bunnfarge.

**Strikkefasthet:** 19 m mønsterstrikk med fletter i bredden på p nr. 4 eller 4½ måler 10 cm. **Husk at strikkefastheten må holdes hvis resultatet skal bli vellykket.**

**Ryggen**
Legg opp 59-63-67-71-79 m på p nr. 3½ og str vr-bord med 1 r og 1 vr i 5-5-6-6-7 cm. Skift til p nr. 4 eller 4½ og øk samtidig jevnt fordelt til 69-75-83-91-99 m. Str mønster etter diagrammet til arb måler 44-46-48-50-54 cm. Fell av m.

**Forstykket**
Str som ryggen til arb måler 28-30-32-34-38 cm. Fell av de midterste 23-25-27-29-29 m til hals. Str hver side for seg. Fortsett til arb måler som ryggen. Fell de resterende m av. Str det andre forstykket likt.

**Ermene**
Legg opp 28-30-32-34-36 m på strømpepp nr. 3½ og str 5-5-6-6-7 cm rundt i vrangbordstr med 1 r, 1 vr. Skift til strømpep nr. 4 eller 4½ og øk samtidig jevnt fordelt til 54-54-54-56-58 m. Str mønster etter diagrammet og sett et merke over 2 m midt under ermet ved omg beg. Øk 1 m på hver side av de 2 midtm hver 4. omg til det er 90-92-94-96-100 m på p. De nye m str inn i mønsteret etter hvert. Når arb måler 32-34-36-38-42 cm, felles m av til en pen, jevn kant som ikke strammer. Str det andre ermet likt.







**Montering og hals**
Sy eller mask sm m på skuldrene. Sy sidesømmene opp til ermehullet (mål overvidden på ermene). Sy i ermene. Str eller plukk opp ca. 81-83-85-89-89 m på p nr.3½ langs sidene i splitten på hver side foran, langs halsen og nakken. Str frem og tilbake i vrangbordstr med 1 r, og 1 vr i ca. 8-9-10-11-12 cm. Fell av i vrangbordstr til en pen, jevn kant som ikke strammer. Sy vr-borden pent til om hverandre langs kanten midt foran. Fest alle løse tråder pent på vrangen.

*Legg plagget flatt i fasong under fuktige håndklær og la det ligge til det er tørt.*

Tógvheilsølan
TRÁÐUR SP/F
Tlf. 312727
Sverrisgeta 19 · Postboks 181 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 31 27 27 · Fax +298 31 96 23 · Mobile +298 21 77 27
Privat: Tel +298 31 66 46